# Er ALS-skipanin bert fyri tey útvaldu?

ELI BRIMSVÍK



Nú arbeiðsloysið noyðir fólk av føroyska arbeiðsmarknaðinum vísur veruleikin, at stórur mannamunur verður framdur.

Dømi er um útlendingar, sum hava starvast hjá eini stórari føroyskari fyritøku - í mong Harrans ár – eru fyri stórum órætti, og tí eru komin í eina ótolandi støðu.

Nú fyritøkan, sum so nógvar aðrar, er noydd at trimma seg til tíðina, sum er - hevur verið neyðugt at siga nakrar útlendingar úr starvi.

Útlendingarnir hava verið undir fullari skattskyldu, og hava rindað alt, sum lógin ásetur - eisini ALS-gjald, og tí eiga tey sjálvandi, at fáa útgjald frá ALS.

Men nei, tey fáa at vita, at tað letur seg ikki gera. Tað verður sagt, at ein paragraff í lógini forðar fyri hesum. Orsøkin verður søgd at vera, at viðkomandi hava bert arbeiðsloyvi hjá einum arbeiðsgevara.

Her er – í minsta lagi - talan um stórt órættvísi.

Tað fyrsta fólk spyrja er, hvussu man kann noyða fólk at gjalda inn í eina skipan, tá somu fólk ikki kunnu fáa nakað úr skipanini, tá tey verða rakt av arbeiðsloysi.

Tí spyrja nógv um talan ikki er um brot á grundleggjandi mannarættindi, tá man noyður fólk at gjalda inni í eina arbeiðsloysisskipan, sum tey kortini ikki kunnu fáa nakra hjálp frá, tá tey gerast arbeiðsleys.

Tað átti at sagt seg sjálvt, at tað ber ikki til at krevja av fólki, at tey gjalda inn í eina skipan, sum ikki kann gjalda teimum úr skipanini, tá ið tey – sum øll onnur - hava brúk fyri tí.

Her er – snøgt sagt - onki rættvísi, og tí er talan um eina stóra skomm fyri Føroya land.

Tað skal vera mín vón, at avvarandi landstýrismaður tekur stig til at fáa loyst hetta átrokandi mál. Tað eru tveir møguleikar, annaðhvørt eiga hesi fólk at fáa endurgoldið tann pening, sum tey hava goldið inn í ALS, ella fáa hesi fólk útgjald úr ALS á jøvnum føti við øll onnur í føroyska samfelagnum.

Alt annað er ósømiligt fyri okkum føroyingar.

# Javnaðarflokkurin skapar úrslitini – men Sambandsflokkurin fær vinningin!

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Sambært seinastu gallupkanningini, so rýma veljarar úr Javnaðarflokkinum yvir til Sambandsflokkin.

Tað kann undra mangan, tí síðan sambandsflokkurin fekk politiska ábyrgdina á týðandi vælferðarpolitiskum økjum, eru umstøðurnar fyri teir veikastu samfelagsbólkarnar verðsnaðar munandi av skerjingum og sparingum.

Vit kunnu bert nevna nøkur dømi á almannaøkinum:

**Pensjónirnar**
Tað er fyrst og fremst Javnaðarflokkinum og Hans Paula Strøm fyri at takka, at pensjónirnar hækkaðu so nógv árini 2004-08, sum aldrin áður.

Serliga er tað hækkingin av Samhaldsfasta umframt viðbótin til ávísar pensjónistar (sum verður útgoldin kvartalsliga), so nú er samanlagda pensjónin hjá støkum farin úr 7.825 kr. um mánaðin til nú 10.329 kr. – ein hækking uppá 32%.

Og fyri hjún, sum eru pensjónistar, er hon farin úr 12.373 kr. um mánaðin til nú 16.966 kr. – ein hækking uppá 37%. Her er talan um pensjónistar uttan aðra munandi inntøku.

Men tað sum hendi, nú Sambandsflokkurin fekk ábyrgdina av almannaøkinum, var, at javningin at pensjónsviðbótini varð skorin niður úr 4 til 3%. Hetta var spariuppskot hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum, og ikki skerjing hjá fíggjarnevndini.

**Dagtilhaldini**
Meðan Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina á almannaøkinum, øktist stuðulin til umsorgararbeiði, tvs. til dagtilhald og mattænastu til pensjónistar, úr 3,1 mió.kr. í 2003 til 6,8 mió kr. Í 2008.

Tá Sambandsflokkurin fekk ábyrgdina á hesum øki, var stuðulin skorin niður við 4 mió kr, við at stuðulin til dagtilhaldini heilt var skorin burtur. Hetta var heldur ikki skerjing hjá fíggjarnevndini, men spariuppskot hjá landsstýriskvinnuni.

**Eldraøkið**
Meðan Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina á eldraøkinum, vóru so nógv búpláss á røktarheimum og eldrasambýlum tikin í nýtslu sum ongantíð áður. Heili 159 nýggj pláss árini 2004-08. Tað skal tó leggjast afturat her, at tilsøgnir upp á nøkur av hesum plássum varð latin av undanfarna landsstýri.

Talið av starvsfólkum í heimarøktini og eldrarøktini annars øktust samstundis við 210 fólkum.

Teir ovurstóru trupulleikarnir, sum eru á eldraøkinum nú, tað verið seg serliga í miðstaðarøkinum, krevja at heimarøktin fær økta játtan til bráðfeingis trupulleikarnar, og at størri ferð verður sett á fyri at útvega búpláss, m.a. við at fáa byggingina ígongd av samtyktu røktarheimsverkætlanunum í Havn, í Vági og í Vestmanna.

Sum skilst, so arbeiða flokkarnir nú í sonevndu "lítlu samgongu" við at finna eykajáttan at fáa eldraøkinum eina munandi hækking av játtanini, soleiðis at gongd kann koma á hesar verkætlanir. Hetta er sett í gongd eftir kravi frá Javnaðarflokkinum!

**Fyritíðarpensjónistar**
Meðan Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina á almannaøkinum, vóru 3 stórar forbetringar gjørdar hjá fyritíðarpensjónistum. Við lógarbroyting í 2007 varð lægsta fyritíðarpensjón hækkað í 2 stigum við tilsamans 2.660 kr. um mánaðin, so at lægsta fyritíðarpensjón nú er 9.800 fyri ein stakan og 8.400 fyri ein giftan pensjónist - ein hækking uppá 43% hjá tí staka og 53% hjá tí gifta síðani 2007.

Fyri allar fyritíðarpensjónistar varð haraftrat mótrokningin av aðrari inntøku lækkað úr 60 niður í 30%. Og fólk, sum fáa játtaða fyritíðarpensjón aftaná 60 ár, fáa nú ta fullu játtaðu upphæddina, og ikki eina skerda upphædd svarandi til eitt lægri pensjónsstig, so sum tað var galdandi frammanundan. Eisini hetta er eitt stórt framstig, sum Hans Pauli Strøm fekk framt í undanfarna valskeiði.

Men nú tá Sambandsflokkurin fekk ábyrgdina av almannaøkinum, hendi bert ein broyting til tað verra, nevnliga at javningin av fyritíðarpensjónini skorin úr 4 niður til 3%. Hetta var ikki skerjing hjá fíggjarnevndini, men spariuppskot hjá landsstýriskvinnun Sambandsfloksins.

**Bústaðir til sinnisveik**
Meðan Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina á økinum, vóru 3 nýggj sambýli til sinnisveik tikin í nýtslu. Tvær verklagslógir vóru samtyktar, og peningur var settur av til at byggja tveir nýggjar stovnar aftrat, ein í Vági og ein í Havn.

Tað einasta sum er hent, síðani Sambandsflokkurin hevur fingið ábyrgdina av økinum, er avgerðin um at sleppa ætlanini um at byggja nýtt sambýlið til sinnisveik í Havn. Hetta er ikki sparikrav frá fíggjarnevndini, men avgerð hjá landsstýriskvinnu Sambandsfloksins í almannamálum.

**Skilaleysar sparingar á almannaøkinum**
Ein samd fíggjarnevnd - eisini umboðini hjá Tjóðveldi, Miðflokki og Gamla Sjálvstýri - fekk tingið beint fyri jól at samtykkja nakrar vitleysar skerjingar á almannaøkinum!

Fyri at klára hesar skerjingar á økinum er landsstýriskvinnan hjá Sambandsflokkinum komin við nøkrum spariuppskotum, m.a. í almennari forsorg, á økinum fyri brekað og á stovnsøkinum fyri børn og ung. Hetta eru spariuppskot, sum javnaðarfólk á ongan hátt kunnu góðtaka. Tað hevur Javnaðarflokkurin gjørt greitt, og tí hevur "lítla samgonga" nú eina tíð arbeitt við ætlanum um at fáa játtanina til almannaøkið hækkaða munandi.

Tann stóri trupulleikin, er at finna fíggingina til hetta, men vónandi semist samgongan um tað.

**Løgið er tað...**
Tá ABS-samgongan varð skipað í heyst var – fyri at fáa kabaluna at ganga upp í samband við manning av landsstýrinum – gjørt av, at fyrrverandi Almanna- og heilsumálaráðið, sum Hans Pauli Strøm hevur stýrt so fyrimyndarliga síðani 2004, skuldi býtast sundur í tvey, so at Sambandsflokkurin við nýggjari landsstýriskvinnu fekk ábyrgdina av almannamálum, sum hildið varð at hon hevði serligt hegni til.

Síðani hevur verið kaos á almannaøkinum!

Men veljararnir – teir takka Sambandsflokkinum afturfyri, og revsa Javnaðarflokkin - í hvussu er sambært seinastu Gallup.

Skil tað, hvør ið kann!

# Eru pengar rótin til alt ónt?

JÁKUP DANIELSEN



Amerikanski stórbanki setti í fjør hol á eina heimsumfatandi peningakreppu. Síðani hava stjórnir, nevndir, stjórar, palli og marsanna ligið fløt í luftini fyri at bjargast tí sum bjargast kann.

Miðlarnir hava dag eftir dag borið ófrætta tíðindi um bankar og fyritøkur, sum eftir óvandaligari stýring hava fingið stólin settan fyri hurðina. Ein fyri og onnur eftir falla sum korthús.

Starvsfólk og ognarar í bankum og fyritøkum, hava fingið boð um at her er onki at gera. Virksemi steðgar ella ognir, sum tú helt teg at eiga, eru nærmast virðisleysar.

Onkur skal gjalda prísin.

Pengar, sum øll hildu høvdu stórt virði, er nærmast ikki vert tað pappír, sum tað er prentað á. Ja, snedugt nokk, so eru virði í dagsins viðurskiftum, bert máld upp í pengum. Og tá pengar onki virði hava, so hava vit heldur ongi virðir?

Álitið á fyritøkur og fólk eru mált í pengum. Fólk og fyritøkur við nógvum pengum hava ella høvdu størri álit millum manna. Hesi skuldi man síggja upp til, líkamikið hvussu tey vóru komin framat teimum.

Og í hesi strembanini at fáa fleiri pengar, til tess at vinna størri álit, hava fólk og fyritøkur, sett alt í váða. Konservativur hugsunarháttur um at vanda sær við tí tú eigur er avloyst við at satsa alt tú hevur. Og tá kemur orðafelli um, at hann í onki satsar, hann einki vinnur. Bíbliska frásøgnin um talentirnar er umsett til pengar. Set so nógvar pengar í partabrøv ella ognir sum gjørligt, tí tá skal tú vinna enn fleiri pengar?

Ongin setti spurning við, hvar pengarnir til enn fleiri pengar skuldu koma frá? Ongin setti spurning við, at tá tú skalt vinna, so má onkur tapa. Bíbliska frásøgnin spøkir aftur. Hevur tú onki vunnið, so hevur tú tapt og tínar talentir rukku ikki til at verða við í skaranum av teimum sum hava álit millum manna.

Eru so pengar ikki rótin til alt ónt?

Jamen, kanst tú siga, vóru tað ikki pengar, so var tað okkurt annað sum skuldi brúkast til mennað og tryggja framburð í samfelagnum. Víst hevði tað verið so, men hevur nú allur framburður verið so skilagóður? Tá vit ikki tosað um pengar, so tosað vit um hóttanirnar av at vit menniskju ikki vanda okkum um liviumstøðurnar á jørðina og tá leggja vit lítið í, um hon skal latast øðrum at liva í. Ella er trúgv okkara so sterk um at jørðin skal nokk forganga og tá er ongin grund til at fyribyrgja at so verður?

Vit trúgva at vit sleppa í paradísið, óansæð hvussu ólátaði vit hava verið á jørðini. Tað hevði list meg at vita, hvussu talentroknistykkið verður gjørt upp. Hvørji talentir fara at telja mest á dómadegnum ella verða vit bara roknaði fyri at verða líka?